# Stórur áhugi at gerast flogskipari

**Fleiri føroyingar vilja útbúgva seg til flogskipara. Á kunnandi fundi í Miðlahúsinum leygardagin kom hetta týðiliga til sjóndar**

FLOGSKIPARI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Áhugin millum føroyingar at gerast flogskipari hevur verið stórur seinastu árini, og nógv bendir á, at hann ikki er minkaður – tvørturímóti.

Danska fyritøkan Karlog Air Flight Center ApS & Karlog Air Charter ApS, sum lærir upp flogskiparar til rutuflúgving, stóð fyri kunnandi tiltakinum í Miðlahúsinum leygardagin.

Fyritøkan hevur longu útbúgvið fleiri føroyingar, og nú áhugin millum føroyingar at gerast flogskipari alsamt gerst størri, valdi leiðslan at koma til Føroya at halda kunnandi fund um útbúgvingina:

– At arbeiða sum flogskipari er sera spennandi. Arbeiðstíðirnar eru skiftandi og lønin góð. Men vit noyðast alt fyri eitt at viðurkenna, at sum flogskipari er tað ikki altíð líka lætt at leggja tíðina til rættis. Men harafturímóti hava vit heimsins besta arbeiði við nýggjum avbjóðingum hvønn einasta dag og eitt serstakt kontór við frálíkum útsýni, ið broytist alla tíðina, sigur Kristine Kærlåg, flogskipari og stjóri á Karlog Air.

### Krøvini

Fyri at gerast flogskipari á einum ferðafólkaflogfari skal ein vera millum 21-65 ár og hava eina vanliga heilsu, hoyrn og sjón:

– Flest øll halda, at um tey hava okkurt smávegis brek, kunnu tey ikki gerast flogskipari. Men veruliga skalt tú ikki vera nakar supermaður fyri at flúgva eitt ferðafólkaflogfar. Tó kanst tú ikki gerast flogskipari, um tú eitt nú ert litblindur ella epileptikari. Áðrenn útbúgvingin byrjar, skulu øll gjøgnum eina læknaroynd á Ríkissjúkrahúsinum í Keypmannahavn, men hesa royndina nýtist ongum at ræðast, sigur Kristini Kærlåg, meðan hon tó leggur áherðslu á, at Karlog Air einans framleiðir tryggar og góðar flogskiparar á skúlanum:

– Um onkur ikki megnar at lúka krøvini hjá okkum, ja, so verður hann ikki flogskipari.

### Umstøðurnar góðar

Flogskiparaskúlin, Karlog Air, húsast í góðum umstøðum í Sønderborg. Skúlin hevur eitt nú egnan flogvøll at venja á, og gott samanhald er millum næmingarnar á skúlanum, ið flest allir búgva saman á skúlanum:

– Bústaðarmøguleikarnir eru góðir. Til ber at velja millum at búgva á skúlanum og í býnum. Eisini kann ein verða sjálvlesandi, men tað vil eg helst ráða øllum frá. Útbúgvingin tekur 22 intensar mánaðar og er avgjørt ikki ein útbúgving, ein fær sovandi. Tískil er tað ofta ein fyrimunur at búgva á skúlanum, tí har ber altíð til at fáa hjálp, íblástur ella stuðul frá øðrum næmingum, sigur Kristine Kærlåg.

Útbúgving fer í høvuðsheitum fram á skúlanum í Sønderborg og skiftir millum at verða í teori og praksis:

– Tann teoretiski parturin er rættiliga strævin og rúgvismikil, men so skjótt ein sleppur at flúgva, fær ein aftur áræði at halda fram við nógva lesnaðinum, heldur Kristine Kærlåg.

Prísurin fyri flogskiparaútbúgvingina er 535.00 krónur umframt innivist og eyðkennisbúna, men ikki er neyðugt at gjalda alt í senn. Til ber somuleiðis at fáa S.U. teir 22 mánaðarnar skúlin tekur.



*Kristina Kærlåg, flogskipari og stjóri á Karlog Air*

Jón Falkvard:

# – At gerast flogskipari er einki léttisoppaverk

**– Tú noyðist at geva teg 100% í lestrartíðini. Tað nyttar einki at fara á flogskiparaskúla, um tú ikki veruliga brennur fyri sakini, sigur 23 ára gamli flogskiparin, Jón Falkvard**

FLOGSKIPARI
*Lív Højsted Horsdal*
*horsdal@sosialurin.fo*

Fyri góðum ári síðan fekk 23 ára gamli Jón Falkvard úr Sørvági prógv sum flogskipari. Jón Falkvard gekk á flogskiparaskúlanum, Karlog Air, í samfullar 22 mánaðar og hevur síðan lokna útbúgving arbeitt sum flogskipari hjá Atlantic Airways. Nú nýggja flogfelagið Faroe Jet byrjar sína rutuflúgving, fer Jón Falkvard at royna seg sum flogskipari hjá nýggja flogfelagnum:

– Eg havi altíð viljað verið flogskipari, og tað var ein løtt avgerð at taka at fara á flogskiparaskúla, sigur Jón Falkvard.

Tá Jón Falkvard varð liðugur í fólkaskúlanum, valdi hann heldur at fara beinleiðis út á arbeiðsmarknaðin í staðin fyri at halda leiðina á miðnámskúla saman við hinum floksfeløgunum.

– Eg havi ongantíð gingið á nøkrum miðnámskúla, men hóast hetta eri eg nú flogskipari. Eg havi ongantíð verið stinnur í teori, men við einum góðum vilja megnaði eg at koma gjøgnum rúgvismikla lesnaðin á flogskiparaskúlanum. Men at læra at flúgva var ongantíð nakar trupulleiki, sigur Jón Falkvard.

### Strævin tíð

Jón Falkvard játtar, at tað er strævið at ganga á flogskiparaskúla, men heldur tað er ein fyrimunur, at flogskiparaskúlin hjá Karlog Air liggur so avsíðis:

– Eg kendi næstan ongan í Danmark, so eg hevði ikki fyri neyðini at halda frí í vikuskiftinum. Eg las út í eitt allar gerandisdagarnar og fleyg í vikuskiftinum, tá hini høvdu frí. Tað er heldur einki sum eitur frítíð á skúlanum – hvørki á jólum, páskum ella um summarið. Hetta tykist kanska ótolandi, men stóri hugurin eftir at flúgva drívur verkið, sigur Jón Falkvard við brosandi eygum og leggur afturat, at í lestrartíðini hevur ein hvørki ráð ella tíð til at dusa sær í býnum og annað, tí tað er dýrt at ganga á flogskiparaskúla.



*– Sjálvandi ert tú spentur, tá tú fert á flog í ringum veðri, men í góðum veðri er tað eitt satt upplivilsi, sigur Jón Falkvard, flogskipari*

Í lestrartíðini búði Jón á sjálvum skúlanum hjá Karlog Air í Sønderborg, og har hevði hann tað ófert:

– Øll hjálptu og stuðlaðu hvørjum øðrum. Á skúlanum vórðu vit heldur ikki órógvað av nøkrum, og tað vísti seg veruliga, at tey, ið ikki búðu á skúlanum, kláraðu seg verri samanumtikið.

Hóast lestrartíðin var strævin, angrar Jón onga løtu, at hann fór á flogskiparaskúla:

– Eg elski at flúgva og mæli øllum, ið veruliga brenna fyri hesum, at fara á flogskiparaskúla. At byrja við pumpaði adrenalinið í kroppinum hvørja ferð, eg fór á flog. Men alt er ein vanasak, og nú nýti eg bara hvørja løtu í luftini, sigur Jón Falkvard at enda.